## Fabregas klárur í apríl

Spanski miðvallarin Cesc Fabregas hevur digist við knæskaða síðani á jólum, og tað verður neyvan í hesum ella næsta mánaði, at Fabregas spælir fyri Arsenal aftur. - Læknarnir hava sagt, eg kann ikki nerta ein bólt næstu 10 dagarnar. Eg skal halda fram við styrkisvenjingum, men vónandi kann eg spæla aftur um einar 6 vikur, sigur 21 ára gamli Fabregas.



## Løvenkrands trívist í Newcastle

Danski álopsspælarin Peter Løvenkrands hevur havt tað trupult í Týsklandi seinnu árini, men nú hevur hann fingið luft undir veingirnar í enska felagnum Newcaslte, hagar hann skifti í januar. - Eg eri sera fegin um at vera her, og eg njóti at spæla fótbólt. Familjan er fallin væl til, og eg havi funnið stuttleikan aftur í fótbóltinum, sigur Løvenkrands við Northern Echo.

# Bellamy gav United hjálpandi hond

**Við góðari hjálp frá arvafíggindanum Manchester City tók Manchester United enn eitt fet ímóti meistaraheitinum. Samstundis køvir Craig Bellamy meistaradreymin hjá sínum fyrrverandi felag**

PREMIER LEAGUE

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Manchester City hevur keypt leikara oman á leikara hetta kappingarárið, soleiðis at felagið kann manga seg millum tey fremstu í deildini. Enn hevur hetta ikki hepnast felagnum, men um vikuskiftið kom møguliga nakað av ábendingum um, at felagið kann gera seg galdandi.

Við útivallarjavnleikinum móti Liverpool hevur Manchester City aftur staðfest, at teir kunnu arga oddaliðini. Arga var eisini júst tað, Manchester City gjørdi við Liverpool seinnapartin í gjár. Ikki einans kostaði 1-1 javnleikurin Liverpool tvey týdningarmikil stig í oddastríðnum, men høvuðsarkitekturin fyri málið hjá Manchester City, var fyrrverandi Liverpool-leikarin Craig Bellamy. Harvið er hann við at punktera meistaradreymin hjá Liverpool. Ein beiskur veruleiki á Anfield Road. Gaman í, tað eydnaðist Dirk Kuyt at javna fyri Liverpool, men tá Manchester United fær trý stig, so nyttar lítið at Liverpool fær eittans stigið.

Júst hesin veruleiki hevur helst eisini ligið í bakhøvdinum í fleiri av City-leikarunum, at teir við javnleikinum hava hjálpt arvafíggindunum, Manchester United, eitt stórt fet ímóti enska meistaraheitinum.

## Munur á gongdini

Uttan mun til hjálp frá øðrum liðum ella ikki, so greiðir Manchester United eftir øllum at døma sín setning hvørja ferð. Um vikuskiftið vitjaði Blackburn á Old Trafford. Talan gjørdist um ein 2-1 sigur, har Rooney og Ronaldo gjørdi málini fyri Manchester United, meðan Santa Cruz skoraði fyri Blackburn. Harvið er kom loksins hol á hjá Manchester United, sum megnaði verja egið mál í samfullar 1333 minuttir á rað.

Sigurin hjá Manchester United er tann tíggjundi á rað. Samanbera vit við kappingarneytan Liverpool, sum eins og Manchester United, eru ósigraðir í 15 dystir, so hevur Liverpool spælt átta javnleikir seinastu 13 dystirnar, meðan Manchester United bert hevur fingið ein javnleik sínar seinastu 13 dystir.



*Craig Bellamy skoraði fyri fjórðu ferð í hesum kappingarárinum ímóti einum felagið, hann áður hevur umboðað. Hini trý málini eru gjørd ímóti Blackburn og tvær ferðir ímóti Newcastle*

*Mynd: Polfoto/AP*

Av tí sama eru heili sjey stig á muni liðanna millum, nú 26 dystir eru spældir í Premier League. Harvið stevnir Manchester United beinleiðis ímóti sínum 18. enska meistaraheitið, og tað nívir hjá kappingarneytanum Liverpool.

Teir hava vunnið enska meistaraheitið oftari enn nakar annar – nevniliga 18 ferðir. Harvið stendur metið fyrri falli. Støðan gerst ikki betri av, at seinasta ferðin Liverpool vann var í 1990.

## Gongur strilti

Støðan er heldur ikki góð hjá Middlesbrough. Seinast felagið vann ein dyst var 9. november í fjør. 14 dystir á rað hevur Middlesbrough annaðhvørt tapt ella spælt javnleik. Tað merkir, at liðið, sum spældi málleysan javnleik ímóti Wigan hetta umfarið, liggur á næstaftasta plássinum í Premier League – eitt stig frammanfyri West Bromwich.

Lítið frægari er støðan hjá Hull. Uppflytararnir tóku alt og øll á bóli, tá kappingin byrjaði, og tá níggju dystir vóru spældir, lá Hull á triðja plássi. Hetta var 25. oktober í fjør, men síðani hevur Hull einans vunnið ein av teimum næstu 16 dystunum.

Hesa keðiligu gongd hevur Hull møguleika at broyta í kvøld, tá Tottenham vitjar.

## Toppskjúttin steðgaði Villa

Av øðrum áhugaverdum hagtølum er vert at tríva í tapið hjá Aston Villa fyri Chelsea. Undan dystinum leygardagin var liðið ósigrað 13 dystir á rað, men hesa góðu gongd broyttu Chelsea og nýggi venjarin Hiddink, tá teir vitjaðu á Villa Park. Anelka skoraði einasta málið í dystinum. Hetta var hansara 15. mál í Premier League higartil, og tað ger hann til toppskjútta. Næstur honum er Ronaldo við 12 málum.

**Premier League**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd | 26 | 19 | - | 5 | - | 2 | 46 | 11 | 35 | 62 |
| 2 Liverpool | 26 | 15 | - | 10 | - | 1 | 43 | 18 | 25 | 55 |
| 3 Chelsea | 26 | 15 | - | 7 | - | 4 | 45 | 15 | 30 | 52 |
| 4 Aston Villa | 26 | 15 | - | 6 | - | 5 | 40 | 25 | 15 | 51 |
| 5 Arsenal | 26 | 12 | - | 9 | - | 5 | 38 | 25 | 13 | 45 |
| 6 Everton | 26 | 11 | - | 8 | - | 7 | 34 | 28 | 6 | 41 |
| 7 Wigan | 26 | 9 | - | 8 | - | 9 | 26 | 24 | 2 | 35 |
| 8 Fulham | 25 | 8 | - | 9 | - | 8 | 24 | 22 | 2 | 33 |
| 9 West Ham | 26 | 9 | - | 6 | - | 11 | 32 | 34 | -2 | 33 |
| 10 Man City | 26 | 9 | - | 5 | - | 12 | 43 | 35 | 8 | 32 |
| 11 Sunderland | 26 | 8 | - | 7 | - | 11 | 27 | 33 | -6 | 31 |
| 12 Bolton | 26 | 9 | - | 3 | - | 14 | 29 | 38 | -9 | 30 |
| 13 Hull | 25 | 7 | - | 8 | - | 10 | 31 | 46 | -15 | 29 |
| 14 Newcastle | 26 | 6 | - | 10 | - | 10 | 33 | 42 | -9 | 28 |
| 15 Portsmouth | 26 | 7 | - | 7 | - | 12 | 29 | 43 | -14 | 28 |
| 16 Tottenham | 25 | 6 | - | 7 | - | 12 | 26 | 31 | -5 | 25 |
| 17 Stoke | 26 | 6 | - | 7 | - | 13 | 23 | 42 | -19 | 25 |
| 18 Blackburn | 25 | 5 | - | 8 | - | 12 | 28 | 42 | -14 | 23 |
| 19 Middlesbr. | 26 | 5 | - | 8 | - | 13 | 18 | 36 | -18 | 23 |
| 20 WBA | 26 | 6 | - | 4 | - | 16 | 24 | 49 | -25 | 22 |

## Úrslitini hetta umfarið

| | |
|---|---|
| Newcastle - Everton | 0-0 |
| Liverpool - Manchester City | 1-1 |
| Fulham - West Bromwich | 2-0 |
| Manchester United - Blackburn | 2-1 |
| Arsenal - Sunderland | 0-0 |
| Middlesbrough - Wigan | 0-0 |
| Bolton - West Ham | 2-1 |
| Stoke - Portsmouth | 2-2 |
| Aston Villa - Chelsea | 0-1 |